# Taliban hevur tikið 140 gíslar

Talibanuppreistrarmenn hava tikið fleiri enn 140 sivilar arbeiðarar sum gíslar. Fólkini arbeiddu í Farahøkinum vestliga í Afganistan. Arbeiðararnir vóru um at byggja eina nýggja herstøði til afganska herin. Í økinum er nógv stríð, og herurin hevur havt trupulleikar við at halda stýr á økinum. Fólkini vóru tikin av talibanuppreiðstrarmonnum á einum vegi í Bala Bolukøkinum, har tey vóru á ferð í bussi.

# Eysturkommuna skal hava trivnaðarleiðara

Tann nýggja Eysturkommuna søkir eftir fólki at virka sum trivnaðarleiðari í kommununi. Eysturkommuna, sum umfatar Gøtu og Leirvík, søkir eftir trivnaðarleiðara. Trivnaðarleiðarin skal millum annað tryggja, at børn og ung, frítíð og mentan, heilsa og trivnaður og eldraøkið verða samskipað og rikin so skilagott, sum til ber, skrivar Leirvíkar kommuna á heimasíðu síni. Somuleiðis fær trivnaðarleiðarin ábyrgdina av barnaverndartænastuni í Eysturkommunu. Starvið verður sett frá 1. december, og seinasta freist at søkja er mánadagin 6. oktober 2008 kl. 12.00

# Samkyndur harðskapur í Havn



*Modellmynd*

**Seint leygarkvøldið varð ein ung, samkynd kvinna eftir øllum at døma útsett fyri kropsligum og munnligum ágangi, sum endaði við, at hon fór á Landssjúkrahúsið til observatión fyri heilaskjálvta. Løgreglan stendur enn á berum og vil gjarna frætta frá vitnum**

HARÐSKAPUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Klokkan 04.20 sunnunáttina fekk løgreglan eina fráboðan um, at ein dama varð sligin uttan fyri dansistaðið REX í Havn, og at tað skuldi vera av tí, at hon er samkynd.

Unga kvinnan varð send á Landssjúkrahúsið til observatión fyri heilaskjálvta eftir hendingina, men um hetta var av tí, at hon var sligin, ella um hon var dottin, er enn ógreitt.

## Pínu í høvdið og beinið

Sosialurin hevur tosað við ungu kvinnuna, men sjálv minnist hon ikki, hvat er farið fram. Hon kann bara vátta tað, at hon hevur høvuðpínu og ilt í øðrum beininum, men veit ikki at siga, um hetta er av teirri orsøk, at hon er sligin, ella um tað er tí at hon er dottin.

Satt at siga stendur alt enn rættiliga ógreitt fyri henni, og hon má bara sanna, at alt er rættiliga ósikkurt enn.

## Váttar tríggjar tilburðir

Eitt vitni í hendingini greiðir soleiðs frá hendingunum, sum hann sigur vera tríggjar í tali.

»Eg fór í býin og stóð í barrini, tá eg kom í prát við hana (ungu kvinnuna, red.), sum eg kenni frá fyrr av. Tá vit standa har, kemur ein ungur maður, um 20 til 25 ára aldur yvir til hana og byrjar at spilla hana út og sigur hvussu stórt eitt turnoff hon er og annars vísir á, hvussu vamlisligt tað er, at hon er samkynd. Tað ger hann bæði við orðum og kroppsmáli. Hann virkaði sera aggressivur móti henni, men gjørdi henni einki kroppsligt mein, og eg bað hann taka seg saman, og hann fór at enda avstað.

Seinni aftur sá eg hana standa á dansigólvinum, og tá kemur ein annar maður í sama aldursbólki til hana, og byrjar á sama hátt sum hin undanfarni við útspilling og munnligum ágangi móti henni, av tí at hon er samkynd«, greiðir vitnið frá.

Sama vitni greiðir soleiðs frá víðari hendingum.

»Tá dansistaðið letur aftur, fari eg út gjøgnum inngongdina til dansistaðið, og har standa so nógv fólk í gongini og práta, sum vanligt er. Tá knappliga hoyri eg røddina í henni, og at hon sigur "av for h", og eg vendi mær so við, og síggi at ein maður heldur henni upp móti vegginum, og tað sær út til, at hann júst tá tekur annað knæðið aftur, og tað sá út sum at hann júst hevði langa henni knæðið. Men eg sá so bara í ryggin á gerningsmanninum, og hann vendir sær frá henni og fer avstað, og eg grípi henni, soleiðs at hon ikki skal rúka í gólvið, og fái tískil ikki eyga á, hvør hann er.

Men eftir mínum tykki er tað 100 prosent sikkurt, at hetta snúði seg um tað, at hon er samkynd, og at tað er tí, at hon hevur verið út fyri hesum áganginum.« Hetta sigur also eitt vitni, sum Sosialurin hevur verið í samband við.

## Vilja hava fatur á vitnum

Løgreglan veit enn ikki at siga, hvat er farið fram í málinum, um tað er eitt harðskapsmál ella ikki. Men teir vátta, at teir kanna málið nærri, men eisini, at teir enn leita eftir vitnum, sum kanska kunnu geva eina ábending um, hvat er hent, ella hvør gerningsmaðurin er. Tí kunnu øll tey, ið møguliga hava upplýsingar um málið, venda sær til løgregluna í Havn. Og teir vilja fegnir hava fatur á øllum teimum upplýsingum, teir kunnu fáa fatur á, soleiðs at málið kann uppklárast.

# Tvey størri innbrotsmál uppklárað

**Kriminaldeildin hjá løgregluni í Havn upplýsir, at tvey innbrotsmál eru uppklárað um vikuskifti. Annað var innbrotið í eini hús í A.C. Evensens gøtu, og hitt er eitt mál, har ein maður í fýra umførðum hevði brotið inn í FK í Hoyvík**

INNBROT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið hevur kriminaldeildin hjá løgregluni gjørt eitt ordans hál og uppklárað tvey innbrotsmál, sum hava verið.

Tey bæði málini, talan er um, eru eitt innbrot, sum varð framt í seinastu viku á eini hús í A.C. Evensensgøtu í Havn, har sprutt, málningur og innbúgv fyri millum 60 og 90 túsund krónur varð stolið. Hitt er eitt mál, har talan er um fýra ymisk innbrot, har tilsamans er stolið fyri fitt av peningi í sigarettum, umframt nakað av vekslipeningi.

## Fjáltur kom á innbrotstjóvar

Í málinum um innbrotið í A.C. Evensensgøtu hevur løgreglan handtikið og avhoyrt fimm mans í aldrinum millum 16 og 20 ár. Teir hava allir játta seg sekar í at hava brotið inn í húsini á A.C. Evensensgøtu, og at hava stolið sprutt, ein málning og eitt virðismikið B&O annlegg, sum tilsamans hevði virði á millum 60 og 90 túsund krónur.

Eingin av teimum skuldsettu eru kenningar hjá løgregluni fyri innbrot, men ein av teimum er kendur hjá løgregluni fyri okkurt annað. Teir eru nú allir skuldsettir fyri innbrotið.

Undir avhoyringunum kom millum annað fram, at nakað av tí, teir høvdu stolið, eftir øllum at døma skuldi vera grýtt á sjógv í Gomlu Hoyvíkini. Løgreglan fekk dykkarar at koma á staðið, har hetta skuldi vera grýtt á á sjógv, og staðfest var, at teir talaðu satt.

Dykkararnir funnu hátalarar á staðnum, og at innbrotstjóvarnir høvdu gjørt av at grýta hetta á sjógv kundi bent á, at fjáltur mundi vera komin á teir, og at teir tí valdu at sleppa sær av við hesar.

Men lítið hjálpti, tí teir eru nú funnir og skuldsettir.

Teir hava allir játta seg sekar í innbrotinum, og kriminaldeildin sær nú málið sum endaliga uppklárað.

## Brotið inn fýra ferðir

Umleið klokkan tvey náttina til fríggjadagin fekk løgreglan boð um, at ein innbrotstjóvur hevði brotið seg inn í FK í Hoyvík. Løgreglan fór beint á staðið, og ein maður varð eltur av løgregluni, sum var á veg vekk av staðnum. Okkurt um 10 minuttir seinni varð hann fangaður og tikin við á støðina til avhoyringar.

Tað vísti seg so, at hesin 50 ára gamli maðurin var innbrotstjóvurin, men eisini at hetta innbrotið, har hann varð tikin á búri, ikki varð einasta innbrotið maðurin hevði framt.

Undir avhoyringunum kom tað fram, at hesin sami 50 ára gamli maðurin í trimum øðrum førum hevur brotið inn á sama staði, og at hann hevði stolið rættiliga nógvar sigarettir, umframt at hava tikið nakað av vekslipeningi.

Hesin maðurin er nú skuldsettur fyri øll fýra innbrotini, og kriminaldeildin sær málið sum endaliga uppklárað.